

# Oljuprísurin lækkar aftur í morgun

**Jógvan Hugo Gardar**

28.01.2015 - 08:20

Oljan.fo

Prísurin á olju lækkar aftur í morgun, aftaná at prísurin í gjár hækkaði næstan hálvan annan dollara. Hetta hendi aftaná at marknaðurin tulkaði sleygutekin um at at Opec var við at broyta politikk, og umhugsaði at minka um oljuframleiðsluna fyri at fáa prísin at hækka aftur, skrivar The Wall Street Journal.

Í morgun hevur Saudi-Arabia avvíst hesum, og prísurin fall beinanvegin. Í løtuni liggur oljuprísurin tí umleið 49 dollarum fyri fatið av norðsjóvaroljuni Brent, og tað er ein lækking uppá umleið 0,4 prosent. Amerikanska lættoljan WTI lækkaði eisini við knøppum 0,4 prosentum til 45,53 dollarar í morgun.

Bloomberg News skrivar í morgun at lækkingin í dag hongur saman við at goymslurnar vaksa í USA, samstundis sum Saudi-Arabia hevur givið greið boð um at talan verður ikki um at minka um framleiðsluna.

Stjórin fyri saudiarabiska oljufelagnum Saudi Aramco, Khalid Falih, segði á eini ráðstevnu í saudiarabiska høvuðsstaðnum Riyadh, at tær búskaparligu lógirnar um tilboð og eftirspurning skulu stýra oljuprísinum.